# Posta Stamps

Føroyar

No. 49

September 2021



- Postgjaldsmerki 2021: Søgusigarar
- Jólini 2021
- Vel ársins frímerki 2021

Posta
FAROE ISLANDS







Royndarprent

# Postgjaldsmerki 2021

**Søgusigarar**
Teir hava altíð verið har – í øllum heimsins mentanarøkjum. Søgusigarar, hesi andans fólk, ið hava tilevnað og sett dám á okkara mentunarliga samleika. Fólk hvørs nøvn og verk vit beinanvegin kennast við.

Soleiðis eisini her heima hjá okkum. Um eg nevni Jørgen Frantz Jacobsen (1900 – 1938), rennur eitt kvinnunavn fram fyri einhvønn føroying. Jørgen Frantz, hin ungi tuberklasjúki studenturin, søgufrøðingurin, journalisturin og rithøvundurin, hvørs møðsama lív og ósvaraði kærleiki førdi til stórfingnu ástarskaldsøguna "Barbara." Barbara, hin vakra, flákruta og trúleysa – hvørs sinnalag listamaðurin Bárður Dal Christiansen lýsir við at festa tveir jetmotorar á ryggin á henni. Barbara, lutvíst grundað á søguliga sagnarpersónin Beintu Arhboe (f. Broberg) ið giftist trimum prestum, har tveir doyðu rættuliga ungir og hin triði gjørdist sinnissjúkur – lutvíst á kvinnuna, ið Jørgen Frantz var ásttikin í, systkinabarn hansara Estrid Bannister Good. Estrid metti tó sambandið teirra millum sum vinarlag, og elskaði hann ikki afturímóti. Glaðlynta, men tó óálítandi Barbara í skaldøguni, er ikki meinlík "femme fatale" figurinum í søgnini. Men báðum fattast evnini at avmarka kærleikan til bara at umfata ein mann – og tað leiðir til ein ólukkuligan enda.

Rithøvundanavnið Heðin Brú (Hans Jacob Jacobsen 1901 – 1987) vekir hugsamband til søgur um rembingartíðir. Samfelagsbroytingina, tá Føroyar fóru frá at vera eitt næstan miðaldarligt bóndasamfelag, til nútímans fiskivinnutjóð. Hansara kendasta og mest elskaða skaldsøga man vera "Feðgar á ferð," ein kærleiksfull og eitt sindur tragikomisk lýsing av, tá heiður og siðalag í gamla bóndasamfelagnum bresta saman við hugburðin í nýggju fiskivinnutjóðini. Gamli hampamaðurin Ketil fær nakrar snapsar ov mikið niðurum eftir eitt grindadráp í grannabygdini – og kemur í ovfarakæti at keypa ein hval á uppboðssølu. Restin av søguni snýr seg um hansara royndir, saman við evnalítla soninum, Kálvi, at vinna pening at gjalda roknin-



*Dr. Jacob Jacobsen, sum savnaði og gav út føroyskar sagnir og ævintýr. Listamaður: Bárður Dal Christiansen.*

gina fyri hvalin – soleiðis at hann sleppur undan ómetaligu skommini – at noyðast at selja kúnna.

Dr. Jakob Jakobsen (1864 – 1918) var føroyskur málfrøðingur og folkaminnasavnari, millum annað kendur fyri sínar vísindaritgerðir um norrøna arvin í máli, siðsøgu og máliskum í Hetlandi og á Orknoyggjunum. Her heima er Dr. Jakobsen mest kendur fyri verkið "Færøske Folkesagn og Eventyr," sum varð útgivið í 1901. Eitt blandað savn av sagnum og ævintýrum, savnað á ferðum kring oyggjarnar í 1892 – 93 og seinni aftur í 1898. Umframt søguligu sagnirnar, gevur verkið eitt innlit í forniska heimin, har huldufólk, trøll og dreygar ferðast. Ein heimur ið enn livdi í føroysku tjóðarsálini og mentanini.

Nú vit tosa um søgusigarar, slepst ikki undan tí kendasta og mest hugfloygda av øllum, William Heinesen (1900 – 1991). Í Heinesenska alheiminum hevur sjálvt tað fýrhyrnta og gerandisliga, skeivar vinklar – og í hansara frásagnum úr gomlu Havnini um fyrra aldarmótið, gongur ómildi veruleikin hond í hond við stásiliga og mýtiska alheimin. Seinasta myndevnið hjá listamanninum Bárði Dal Christiansen, er skaldsøgan Móðir Sjeystjørna, har mýtiski alheimurin, áhaldandi stendur fyri falli, orsakað av tunglyntum fundamentalistiskum kristindómi. Hin vakra og lívsglaða Antonia, sum fær ein son uttanfyri hjúnarlag, verður smittað av "sponsku sjúku," tá barnið verður doypt – og doyr síðan frá tí. Fyrstu barnaárini hjá soninum uttan mammuna, sum sambært barnagentuni Ritu, situr í rósingarðinum í Paradísi, í høvuðprýði við sjey stjørnum í. Gandakendi alheimurin hjá lítla dronginum verður tó framvegis ágingin av tí døpru tulking av kristindóminum, sum sibyllan og gamla gentan, Trina við eygunum, umboðar. Ein vøkur og samstundis ræðsluvekjandi tíðarmynd, málað við háfloygdum pensli av einum gudabornum søgusigara.

*Anker Eli Petersen*

## Jólamerkini 2021




30 DKK

## Trý jólakort




25 DKK

# Jólini 2021

Harriet Olafsdóttir hevur tikið myndirnar, sum prýða ársins jólamerkjaark. Myndevnið í ár er seyður.

Harriet er kanska meira kend undir navninum Olafsdóttir, tí hon hevur givið út fleiri vælumtóktar plakatir undir hesum navni. Les meira um Harriet Olafsdóttir á heimasíðu hennara www.byolafsdottir.com.

Avlopið av søluni av jólamerkjaarkinum fer til Jólamerkjagrunnin, ið hevur til endamáls at stuðla tiltøkum fyri børn og ung í Føroyum.
**Jólamerkjaarkið kostar 30,00 kr.**

## Fyrstu jólini

Í fjør gav Posta út eina jólabók. Enn ber til at ogna sær hesa fittu barnabók við tekningunum hjá Suffíu Nón saman við frásøgnini um fyrstu jólini. Bókin er á føroyskum og enskum og hóskar seg væl til bæði smá og størri børn. Róland í Skorini hevur skrivað tekstin.
**Bókin "Fyrstu jólini" kostar 95,- kr.**

## Jólakort

Trý dupult jólakort við myndevnum úr jólamerkjaarkinum fáast eisini til keyps. Jólakortini verða seld sum sett við trimum kortum í hvørjum setti.
**Jólakortini kosta v/ bj. 25,00 kr. settið.**

## Ársmappa 2021

Kundi tú hugsað tær at keypt øll ársins frímerki skjótt og ómakaleyst? So er hetta

## Fyrstu jólini




95 DKK

## Ársmappa 2021




560 DKK

## Árbók 2021




598 DKK

loysnin. Í ársmappuni eru øll frímerki og smáørk, ið eru givin út í ár. Mappan verður seld fyri áljóðandi virði.

**Ársmappan kostar 560,00 kr.**

## Árbók 2021

Árbókin savnar allar ársins frímerkjaútgávur og saman við frímerkjunum fært tú áhugaverdu søguna aftanfyri hvørja útgávu lýsta við greinum og vøkrum myndum. Av útgávunum í ár kunnu m.a. nevnast: Postsøgan 150 ár, Eysturoyartunnilin, Slania 100 ár, Europa, Covid-19 í Føroyum umframt onnur evni.

Tekstirnir í hesi snøggu bók eru á donskum, týskum og enskum og hóskar bókin seg tí sera væl sum gáva til vinir og kenningar uttanlands.

**Árbókin kostar 598,00 kr.**

## Svartprent!

Eitt svartprent av "Cz. Slania 100 ár" er við í árbókini 2021 - púra ókeypis!

Í leysasølu kostar svartprentið 150,00 kr.



# Vel ársins vakrasta frímerki 2021

## og verð við í lutakasti um frálíkar vinningar!




FO 942-944




FO 942-944




FO 956




FO 953




FO 951




FO 952




FO 954




FO 955




FO 959



FO 960



FO 961




FO 957




FO 958




FO 962




FO 963




FO 964




FO 967




FO 968




FO 965-966




FO 969




FO 970

**1. vinningur:**
Eitt ullint teppi frá VIMA



**2. vinningur:**
árbókin 2021




**3. vinningur:**
Slania mappan




**Klipp lepan út og send okkum hann ella atkvøð á www.stamps.fo.**
**Seinasta freist at atkvøða er 15. desembur 2021!**

Navn: ______________________________

Bústaður: ______________________________

Postnr./Bygd: ______________________________

______________________________

______________________________

Kundanr.: ______________________________

**Ársins frímerki 2021 er:**

FO

☐ **Ja,** takk. Eg vil fegin tekna meg fyri tíðindabrævið frá Posta Stamps, sum verður sent við telduposti.

**T-postur:** ______________________________

# Altjóða postkortdagur tann 1. oktobur 2021

Atjóða postkortdagur er ein roynd at fáa fólk at senda postkort tann 1. oktobur, so tey kunnu uppliva, hvussu stuttligt tað er, at senda ella at fáa eitt óvæntað postkort frá vinum, familju og kenningum.

Í hesum sambandi hevur Posta givið út eitt serligt postkort. Postkortið kann keypast sum tað er, ella við frímerki og stemplað við serstempli tann 1. oktobur 2021.




# Nýggjar útgávur 1. oktobur og 4. novembur 2021




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Postgjaldsmerki 2021: Søgusigarar** |
| Útgávudagur: | 01.10.2021 |
| Virði: | 4 x 17,00 kr |
| Stødd: | 55,0 x 22,5 mm |
| Listafólk: | Bárður Dal Christiansen |
| Prentingarháttur: | Flexoprent |
| Prentsmiðja: | Limo Labels, Danmark |




**Ársmappa 2021**
560,00 kr.




**Árbók 2021**
598,00 kr.




**Jólamerki 2021**
30,00 kr.

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Framsíðumynd: Seyður. Myndatøka: By Olafsdóttir. Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

ISSN 1603-0036

/faroestamps

# Nýggjar mappur

## Felagsmappa: Cz. Slania 100 ár

Snøgg mappa, sum verður givin út í sambandi við felagsútgávuna av Cz. Slania, 12. august 2021.




Í mappuni eru tey trý smáørkini frá ávikavist Føroyum, Danmark og Grønlandi, sum øll eru graverað av Martin Mörck. Harafturat er føroyska svartprentið eisini við í mappuni.

Prísur: 225,00 DKK.

## Mappa: Víkingamappa 2021

Sera snøgg víkingamappa við trimum víkingasmáørkum, sum kendi gravørurin, Martin Mörk, hevur sniðgivið og graverað.




Tey trý smáørkini vórðu útgivin í 2002, 2005 og 2015 og eru heitini ávikavist ”Víkingar í Atlantssigling”, ”Gerandisdagur í víkingaøld” og ”Átrúnaður í víkingaøld”.

Prísur: 120,00 DKK.

## Mappa: Sepac 2021

”Old maps” er heitið á 12. Sepac mappuni. Í mappuni er eitt frímerki úr hvørjum Sepac landi.



Á føroyska frímerkinum síggja vit kortið ”*Septentrionales regiones*” frá 1578, sum Sebastian Münster teknaði.

Prísur: 125,00 DKK

**Posta Stamps skal eftir ætlan luttaka á hesum framsýningum.**
**Við fyrivarni fyri avlýsingum orsakað av Covid-19:**

Luttøka uttan serstempul:

- **ELBO 21, Fredericia** 16. - 17. okt., Danmark
- **Keypmannahavn, Valby-hallen** 13. - 14. nov., Danmark

Posta
FAROE ISLANDS

# Bíleggingarlepi - Posta Stamps nr. 49

| Nr. | Vøra | | Prísur DKK | Prísur Euro | Nøgd | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útgáva 01.10.2021 - Postgjaldsmerki 2021 - Søgusigarar** | | | | | | |
| PMA002021 | Postgjaldsmerki 2021, óst. | * | 68,00 | 9,50 | | |
| FMG002021 | Postgjaldsmerki 2021, fdst. | ☉ | 68,00 | 9,50 | | |
| DMG002021 | Postgjaldsmerki 2021, dgst. | ☉ | 68,00 | 9,50 | | |
| FMK002021 | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ☉ | 73,00 | 10,20 | | |
| FML002021 | Fyrstadagsbj. v/einkultmerkjum | ☉ | 79,00 | 11,00 | | |
| **Útgáva 04.11.2021 - Ársmappa, árbók og jólamerki 2021** | | | | | | |
| WPPE02021 | Árbók 2021 | * | 598,00 | 83,70 | | |
| PPY002021 | Ársmappa 2021 | * | 560,00 | 78,40 | | |
| PPX002021 | Jólamerkini 2021 | * | 30,00 | 4,20 | | |
| WJOJ02021 | Jólakort (3 dupult v/bj.) | * | 25,00 | 3,50 | | |
| **Mappur: Heftir og fyrstadagsbjálvar** | | | | | | |
| WHEM02021 | Heftimappa 2021 | * | 376,00 | 52,60 | | |
| WHEM02020 | Heftimappa 2020 | * | 327,00 | 45,80 | | |
| WHEM02019 | Heftimappa 2019 | * | 318,00 | 44,50 | | |
| WHEM02018 | Heftimappa 2018 | * | 288,00 | 40,30 | | |
| WFDM02021 | FDC mappa 2021 | ☉ | 625,00 | 87,50 | | |
| WFDM02020 | FDC mappa 2020 | ☉ | 561,00 | 78,50 | | |
| WFDM02019 | FDC mappa 2019 | ☉ | 551,00 | 77,00 | | |
| WFDM02018 | FDC mappa 2018 | ☉ | 489,00 | 68,45 | | |
| **Síður til lux album** | | | | | | |
| LUS002021 | Síður til lux album 2021 | | 130,00 | 18,20 | | |
| LUS002020 | Síður til lux album 2020 | | 130,00 | 18,20 | | |
| LUS002019 | Síður til lux album 2019 | | 120,00 | 16,80 | | |
| LUS002018 | Síður til lux album 2018 | | 120,00 | 16,80 | | |
| LUS002017 | Síður til lux album 2017 | | 120,00 | 16,80 | | |
| JOS002021 | Síða til jól 2021 | | 30,00 | 4,20 | | |
| JOS002020 | Síða til jól 2020 | | 30,00 | 4,20 | | |
| JOS002019 | Síða til jól 2019 | | 30,00 | 4,20 | | |
| JOS002018 | Síða til jól 2018 | | 30,00 | 4,20 | | |
| JOS002017 | Síða til jól 2017 | | 30,00 | 4,20 | | |
| LUA002021 | Lux album III v/síðum 2015 - 2020 | | 760,00 | 106,40 | | |
| LUA002014 | Lux album II v/síðum 2001-2014 | | 975,00 | 136,50 | | |
| LUA000003 | Lux album uttan síður | | 225,00 | 31,50 | | |

* = óstemplað, ☉= stemplað

| Nr. | Vøra | | Prísur DKK | Prísur Euro | Nøgd | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ymiskt** | | | | | | |
| WBPSLANIA | Svartprent: Cz. Slania 100 ár | * | 150,00 | 21,00 | | |
| WBPDROTNG | Svartprent: Drotningin 80 ár | * | 150,00 | 21,00 | | |
| WBPMYLLUR | Svartprent: Gamlar myllur | * | 150,00 | 21,00 | | |
| WJOLBOK20 | Bók: "Fyrstu jólini" - FO/EN | | 95,00 | 13,30 | | |
| WBTHVNPLA | Plakat: Beethoven 250 ár | | 150,00 | 21,00 | | |
| WPLANDREA | Plakat: Andrea Árting | | 150,00 | 21,00 | | |
| WFWORKS21 | Plakat: Floral Fireworks | | 150,00 | 21,00 | | |
| WALIEN021 | Plakat: Casual Alien | | 150,00 | 21,00 | | |
| WPCD21PPJ | Postkort: World Postcard Day | | 10,00 | 1,40 | | |
| WPCD21FOR | Postkort: World Postcard Day, Føroyar | | 27,00 | 3,75 | | |
| WPCD21WOR | Postkort: World Postcard Day, útheimur | | 37,00 | 5,10 | | |
| WSEP02021 | Sepac mappa nr. 12 (2021) | * | 125,00 | 17,50 | | |
| WSLANIAMA | Mappa: Cz. Slania 100 ár | * | 225,00 | 31,50 | | |
| WVIKMAP21 | Mappa: Víkingamappa 2021 | * | 120,00 | 16,80 | | |
| WDROTNG80 | Mappa: Drotningin 80 ár | * | 295,00 | 41,30 | | |
| **Tilboð** | | | | | | |
| WESTERMAP | Mappa: Westerbeek | Tilboð! | 65,00 | 9,10 | | |
| WSOLARMAP | Mappa: Sólarmyrking 2015 | Tilboð! | 65,00 | 9,10 | | |
| WBÁT02013 | Mappa: Føroyski báturin | Tilboð! | 100,00 | 14,00 | | |
| WSVANAMAP | Mappa: Teir sjey svanirnir | Tilboð! | 65,00 | 9,10 | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | ***Avgreiðslugjald:*** | **25,00** | **3,50** | **1** | **25,00** |
| | | | | **Prísur ialt:** | | |

Vinaliga fyllið út teigarnar aftanfyri! →

## Gevið gætur! Kunning um gjaldskort

Orsakað av nýggju altjóða trygdarásetingini, tí sonevndu "2-parta-góðkenningin", sum kom í gildi, tann 1. januar 2021, kunnu vit ikki handfara gjaldskort eins og áður.

Í staðin bjóða vit eina snilda og trygga loysn, har tú kanst rita inn á okkara heimasíðu og skráseta títt gjaldskort. Á hendan hátt kanst tú lætt og trygt gjalda fyri bæði tíni framtíðar hald eins og fyri eyka bíleggingar.

Tó ber væl til at bíleggja frímerki á www.stamps.fo og gjalda við gjaldskorti, uttan at kortið verður skrásett. Nýggjar útgávur eru vanliga tøkar at bíleggja umleið ein mánaða fyri útgávudagin.

Tú kanst eisini gjalda umvegis gjaldstænastuna PayPal - www.paypal.com, um tú ert tilmeldað/-ur hesa tænastu.

## Gjaldshættir

☐ Upphæddin verður flutt á konto nr. 9870 4271212 hjá Posta Stamps.

☐ Upphæddin skal trekkjast av møguligum ágóða á kundakonto míni.

☐ Upphæddin verður flutt umvegis **PayPal** til stamps@posta.fo.

Vinarliga upplýs kundanummar, tá bílagt og goldið verður.

☐ **Ja, takk. Eg vil fegin fáa tíðindaskriv umvegis teldupost**


Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo


Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Postnr./býur: ____________________

Land: ____________________

T-postur: ____________________

Kundanummar: | | | | | | | |

PS2021